# 200 á Seglloftinum

**Bólkurin 200 gav í vikuni út nýggja fløgu, og hevur havt útgávukonsertir, og nakrar av hesum hava verið uttanfyri Havnina**



*Fríggjakvøldið 17. apríl vitjaði 200 á Seglloftinum á Tvøroyri*
*Mynd; Bjarni Nygaard*

KONSERT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bólkurin 200 er úr Havn, og hevði eisini fyrstu og stóru útgávukonsertina í samband við nýggju útgávuna, í Havnini. Men aðrar útgávukonsertir í samband við fløguna Stockhólmssyndromið, hava verið uttanfyri Havnina, og fríggjakvøldið 17. apríl vitjaði 200 á Seglloftinum á Tvøroyri.

Hóast ikki var heilt fullsett, so var ein fjøld av fjepparum møtt upp, tá 200 hevði útgávukonsert á Seglloftinum, og hýrurin var góður og tikið varð væl ímóti punkbólkinum.

Underbeat tók eisini lut, og skipaði fyri tónleiki eftir konsertina, og gjørdi hetta ikki hýrin verri, sum myndatemaið, ið eisini er her á portal.fo, eisini vísir.

# Fólkatalið í Suðuroynni vaks við 500 leygardagin

**Barnadansistevna var í Suðuroynni leygardagin, og hendan landsstevnan var so væl mannað, at nærum 500 luttakarar leitaðu sær við Smyrli til Suðuroyar leygardagin**

DANSUR
*Dagfinn Olsen*



Føroyski dansurin er væl umtóktur millum tey smærru og tey ungu. Hetta ber Barnadansistevnan, sum var í Suðuroynni í gjár, boð um. Nærum 500 børn, foreldur, ommur og abbar, leitaðu sær til Suðuroyar at vitja dansiglaðar suðuroyingar, ið skipaðu fyri landsstevnuni í ár.

Luttakaralistin taldi eini 480 fólk, men onkur vildi í gjár vera við, at talið kanska var hægri, tí lægst var afturat.

Stevnudansararnir gingu í gongu frá Smyrli á Krambatanga, og til høllina í Trongisvági. Har høvdu fyriskiparar orðið, og øll fóru upp á gólv í skúlahøllini. Eisini var ábit.

Síðani var farið í tveir bólkar, har nøkur fóru norðureftir, og onnur suður eftir oynni. Neyðugt var tó at býta meir sundur, tí so nógvir luttakarar vóru, so sunnan til á oynni fóru nøkur í VB Húsið og nøkur í Dansistovuna í Sumba.

Bussfylgini, ið taldu fleiri stórar bussar, fyltu væl og hugaligt í landslagnum í Suðuroynni leygardagin. Á kvøldi fór dansifólkið aftur norðurum við Smyrli.

ÚTBJÓÐING

Asfaltskoyring fyri Landsverk í 2009

Arbeiðið at koyra asfalt fyri Landsverk í 2009 verður við hesum boðið út í almennari lisitatión.

Útbjóðingartilfar fæst við at venda sær til Landsverk á tlf. 540 841.

Tilboðini skulu vera Landsverki í hendi í seinasta lagi 29-04-2009 kl. 13:00.

**Sí annars heimasíðuna hjá Landsverki á www.landsverk.fo**

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*




www.bs.fo




Aðalfundur í Brúkarasamtakinum

Árligi aðalfundurin verður hildin fríggjadagin tann 24. apríl kl. 17.30 á Hotel Føroyum.

Fríggjadagin tann 24. apríl kl. 17.30 á Hotel Føroyum.

Skráin verður sambært viðtøkunum.
Umframt vanligu skránna fer fyrsta føroyska Brúkaraumboðið, Andrass Arge, at hugleiða um brúkaramál og leiklutin hjá brúkaraumboðnum í hesum høpi.
Øll eru vælkomin.

Brúkara samtakið

Brúkarasamtakið • Postsmoga 1171 • FO-110 Tórshavn